# Homosexualitetur - viðmerking í trimum pørtum

JENIS AV RANA
løgtingsmaður



## 1. partur
## Hagtøl úr leysari luft

Tá hagtøl fyri tey, ið velja at liva móti náttúruni, verða søgd, tykist einki mark vera fyri hugflognum. Tú møtir tølum frá fáum% heilt upp í 10%. Ja, uttan at blúgvast verður tosað um, at í hvørjum skúlaflokki eru fleiri, og at hagfrøðisliga eru fleiri løgtingsmenn í hesum bólki. Tó at væl lærd finnast millum teirra, ið nýta hesi tøl, slík, sum á hægri lærustovnum hava lært týdningin av at skjalprógva, so sært tú sjáldan hesi uppáhald prógvað. Onkuntíð verður Kinsey nevndur, hann sum í royndum og kanningum sínum brúkti slíkar hættir, at kanningar hansara í dag hvørki høvdu verið góðkendar ella loyvdar - í besta føri hevði hann, vegna óetisku kanningarhættir sínar, endað handan rimar.

Men kanningar eru gjørdar, ikki bert á okkara leiðum, men í mongum londum, og hesi tøl siga eina heilt aðra søgu. Úr rúgvuni kunnu vit nevna niðanfyrinevndu lond og tøl:

Noregi: 1%
Bretland: 0,6% kvinnur og 1,4% menn
Frankaríki: 0,4% kvinnur og 1,4% menn
USA: 0,7%
Svøríki 0,5%

Fyri virðið í kjakinum hevði verið bæði rætt og gott, um menn og kvinnur høvdu hesi próvføstu tøl í huga, um tey í framtíðini kenna trongd til at nýta tøl.

### Ymisk heiti

Orðini eru mong, ið verða nýtt at lýsa hesi, ið velja at liva móti náttúruni. Summi tíverri spottandi, niðrandi og vanvirðandi, meðan onnur greinliga lýsa fyribrigdið. Millum hesi finna vit í orðabókini orðið kynvill. Lesa vit í samheitaorðabókini, ið kom út á forlagnum Stiðin í 2000, stendur soleiðis undir samkyndur: sí kynvillingur. Í donsk-føroysk orðabók eftir Johannes av Skarði og Jóhan Hendrik W. Poulsen, í ískoytinum frá 1977, lesa vit undir orðinum homosexuell: kynviltur, kynrangur, og fyri "en homosexuell": kynvillingur. Her er talan um eitt orð, ið greitt lýsir fyribrigdið, meðan íslendska samkynd tvørturímóti gruggar og beinleiðis villleiðir.

### Hvat sigur Bíblian?

Vit kenna øll byrjanina, skrivað stendur, at: í upphavi skapti Gud Himmal og jørð... Víðari lesa vit fyri hvønn skapanardagin, at: Gud sá, at tað var gott. Tá Hann sjeynda dagin skapti menniskjuna, lesa vit: sum mann og kvinnu/kall og konu skapti Hann tey, og tá lesa vit enntá, at: Gud sá alt tað, ið Hann hevði gjørt, og tað var sera gott. Og uppgávan var greið: nørist, vaksið í tali, fyllið jørðina!

Heilt frá byrjan skapanarverksins hevur stríðið leikað í, ikki primert millum menniskju, men millum Skaparan og mótstøðumannin, hann, sum sambært Jesusi er komin fyri at stjala, drepa og forkoma. Hann byrjaði fyri 2000 árum síðani við spurninginum: hevur nú Gud sagt, og synd er at siga, at taktikkur hansara er broyttur stórvegis. Og hví skuldi hann tað, væl hevur eydnast. Heimurin, sum skuldi vera eitt friðarstað, er gjøgnumsúrgaður av óndu ætlanum hansara- misnýtslu, kríggi, hatri, hungri, vónloysi, sviki, vantrúgv og deyða, og vit kundu hildið á. Alt hetta, tí honum eydnast at fáa menniskjuna at lurta eftir sær, heldur enn eftir Skaparanum og orði Hansara.

At lokka menniskja at seta spurnartekin við, hvat Gud metir um homosexuellan lívsstíl - tað er bert ein av mongu lygnum hansara. Endamálið er jú at sáa iva um Gud og orð hansara og at oyðileggja skapanarverk Guds, sum kundi verið so trygt, friðsælt og gott. Umframt dagsaktuellu heimsstøðuna er vert at lesa, hvussu ómetaligi óndskapur hansara, saman við eftirgevan menniskjans, oyddi býirnar Sodoma og Gomorra, einans vegna homosexuellu tráaninar, mong teirra góvu seg yvir til. ( sí 1. mós.bók. kap. 19).

### Eru tey sjúk?

Av og á eru greinir í bløðunum, sum vilja vera við, at "homosexuel" eru sjúk og tí møguliga kunnu lekjast. Sjálvandi kunnu hesi lekjast, um hann, ið er førur fyri at lekja hvørt sár, hvørja sjúku og hvønn veikleika sleppur framat. Men læknavísindin kann ikki lekja hesi av teirri einføldu orsøk, at tað at liva sum homosexuellur er ikki ein sjúka, men eitt tilvitað val, eins og onnur val, menniskjað tekur í lívi sínum.

Men, spyr tú meg kanskatú kennir heilt vist onkran, sum frá barni av týðuliga hevur skilt seg út, verið kventrasligur- líkst einum homosexuellum. Jú, so vist. Men at døma hesi at vera, ella at fara at gerast, homosexuel, bert tí tey hava øðrvísi útsjónd enn onnur, er størsti órættur, ið gerast kann móti menniskjum. Mong munnu í barnaárum av óróttum hava liðið ósigiligt av at vera viðfarin sum homosexuell, og hava kanska at enda góðtikið lygnina, meðan tann dømandi hevur fingið fordómar sínar staðfestar.

### Liva tey eitt lætt lív?

Hagtøl, ið siga frá lívsdygd teirra, ið liva sum homosexuell, eru bæði ræðandi og syrgilig. Lív teirra, ið av Skaparanum var ætlað trygt og friðfult saman við Honum, ber eftir sær eina slóð av vónloysi, uppgevan og misbrúki. Sammett við tey, ið liva lív sítt sambært náttúruni, er bæði misnýtslan av rúsdrekka, rúsandi evnum og sjálvmorðsroyndir í hesum bólki tvífaldað. Vónloysi sermerkir hesi tøl, og tað av góðum grundum, tað kann ikki vera ørðvísi, tá tú livir eitt lív, ið tú ikki er skaptur at liva.

Dentur skal verða lagdur á, at hesi tøl eru frá umhvørvum, har fult út verður góðtikið at liva móti náttúruni. Um liviumstøðurnar í hesum umhvørvum verður sagt, at tær eru merktar av einsemi, skilnaði, vónloysi, kynismu, sjálvgóðsku, slatri, sexfocuseran, baktali, lokabrøgdum, isolatión, eyðmýkjan v.m.

### Metir Bíblian hesa syndina vera verri enn aðrar?

Nei, als ikki!

Bíblian ger púra greitt, at vit øll hava syndað og tørva ta rættvísi, sum bert Gud kann geva, gjøgnum tað verk, Jesus gjørdi á Golgata. Eins týðuligt boðar Gud í orði sínum, at eingin gradmunur er á syndum. Vit hava øll syndað, vit synda øll dagliga, hvør syndin er, er ikki avgerandi- avgerandi er bert, at vit venda okkum til Hann, sum kann fyrigeva allar syndir okkara.

Men óreingiligt er, at Bíblian tosar beinleiðis og ávarandi móti at liva sum homosexuellur, og orðini vit lesa um hesa synd eru ikki mjúk. Tóat tað ljóðar dømandi og ógvusligt, so er tað ein veruleiki, at orð Guds lýsir enntá andstygd hansara yvirfyri tí, at maður livir við manni og kvinna livir við kvinnu, eins og tvey av sama kyni gera. Hetta mugu vit fyrihalda okkum til, um vit tosa um Gud og trúarviðurskifti í sambandi við homosexualitet. Vit kunnu heldur ikki velja at gloyma Sodoma og Gomorra - lagnan - ella dómurin- hjá hesum býum kom eina og áleina av homosexuella livihátinum, ið har ráddi. Tað kann eingin tosa seg burtur úr. Og eins lítið og menniskjan er broytt, er Skapari tess!!!

At kalla seg kristnan, men samstundis vísa frá sær, og stríðast móti greiða boðskapi Bíbliunnar um at halda seg frá homosexuellum livihátti, er ein andsøgn, ið als ikki ber til. Hvussu kunnu vit siga okkum tæna og elska Gud, men samstundis leggja líka í tey ynskir, hann hevur fyri lívsførslu okkara?

Øll synd særir Faðirin, sum leingist eftir at síggja barn sítt liva tað lív, hvør einasti ein er ætlaður at liva. Eitt lív saman við Honum, í tí ætlan, Hann legði til reiðar, áðrenn heimurin varð grundaður, og áðrenn ein einasti av lividøgum mínum hevði sæð dagsins ljós.

# Syndajáttan

JÁKUP VANG



Eg trúgvi, at Harrin hevur víst mær nakað, sum eg eri villigur at fara inn í, tí eg veit, at Harrin er við mær.

Eg kom at hugsa um, at nógv menniskju eru kroyst og tyngd av teirra kynsligu driftum. Serliga nú so nógv hevur verið skrivað um homoseksualitet.

Tað hevur verið víst á av trúgvandi, at tað er synd at dyrka homoseksualitet.

Eg ivist onga løtu í, at tað eru mong, sum stríðast við henda spurning.

Nú skal eg siga frá mær sjálvum, fyri at onkur má finna vegin til frælsi - til fríheit frá hesi plágu, sum holdið og djevulin leiða okkum útí.

Tað mesta av mínum lívi, havi eg verið plágaður av holdsins lystum. Eg havi ikki havt kontrol, stýr, á mínum fantasium um tað kynsliga, og har hevur ein partur verið merktur av homoseksualiteti.

Eitt er at hava hug á kvinnum. Tað er púra í ordan. Men – ein má kunna stýra sær. Og ikki volka sær í fyrilitaleysari kynsligari gyklumyndum. Tað var nakað, sum eg skammaðist yvir og gav mær ringa samvitsku.

Men – tað sum var verri. Eg varð leiddur av mínum synduga holdið og djevulinum inn á tað homoseksuella fantasimynstrið. Eg visti, at tað var skeivt, men – eg lat meg reka við, við hesum lystum, sum eg illa kundi stýra.

Einaferð gjørdi eg meg inn á ein fullan ungdóm. Eg var sjálvur fullur. Eg biðji hann fyrigeva mær í Jesu navni.

Eg hevði ongan at tosa við. Psykiatararnir kundu ella vildu ikki hjálpa mær.

Men, men, tað var ein, sum kundi og vildi hjálpa mær. Og tað var Jesus.

Hann sá mína neyð og hoyrdi míni neyðarróp á Hann.

Í langmóð síni hevði Hann tol við mær. Eg var komin til trúgv á Jesus fyri mongum árum síðani. Og ein dagin setti Hann meg í fullkomi frælsi. Eg eri losytur frá allari synd við Hansara náði.

Tað kann ein og hvør, sum vendir seg til Hansara í sannari irðan, uppliva.

Eg stóð púra aleina við mínum trupulleikum. Harrin eina hevur hjálpt mær. Hann eigur alla æru og tøkk í Jesu dýra navni.

Kæri vinur, søk, ákalla Jesus og tú skalt verða settur í fríheit. Skrivað stendur: Tí at hvør tann, sum ákallar navn Harrans, skal verða frelstur. Róm. 10.13.

Fyri alt tað, les allan kap. 10. Gud er góður. Hann er ikki komin at døma heimin, men at frelsa, bjarga.

Enn er náði at finna hjá Jesusi

## Kórnótakunning og skeið í rytmiskari kórleiðslu

KÓRNÓTAR

Kórsamband Føroya hevur seinastu árini havt høvi til at gera rættiliga stóra íløgu í eitt kórnótasavn, sum í samarbeiði við kórsambandið verður umsitið av Landsmiðstøðini. Úrslitið er tí eitt sera umfatandi úrval av kórnótatilfari, sum er tøkt fyrst og fremst hjá limakórum, men eisini hjá øðrum kórum, skúlum og stovnum annars, har kórsangur er aktuellur, at lána av.

Savnið umfatar kórsatsir innan allar greinar frá renaissancu og fram til okkara dagar: 2-raddaðar barnasangir til framkomnan a cappella kórsang (kvinnukór, manskór og blandað kór), klassiskt sum "rytmiskt", og eisini størri tónaverk t. d. eftir Bach, Mozart og Schubert upprunaliga skrivað við orkesturfylgispæli, men her skipað fyri kór, soli og orgul. Í stuttum er talan um um hálvtannað hundrað kórbøkur og – bóklingar umframt eini 25 sett à 35 stk. av leysum kórsatsbløðum.

Til tess í verki at gera vart við og kunna um hetta mikla nótasavn og hesar møguleikar hjá kórum við leiðarum teirra at fáa gagn og íblástur av, skipar kórsambandið fyri kunningarverkskeiði fríggjadagin og leygardagin 27. og 28. oktober. Á skeiðinum fer Steen Lindholm, kendur kórleiðari, urguleikari og statssettur ráðgevi í tónleikamálum, at gjøgnumganga klassiska partin í savninum. Nýsetti og fyrsti danski professarin í rytmiskum kórsangi Jim Daus Hjernøe tekur sær av rytmiska partinum, men fer harumframt at leggja skeiðluttakarunum lag á at handfara rytmiskan tónleik í kórsangi.

Verkskeiðið verður hildið í sangstovu Tórshavnar Kommunuskúla. Tað er ókeypis hjá leiðarum hjá limakórum kórsambandsins - onnur gjalda 500 kr.

Tilmelding í seinasta lagið mánadagin 23. oktober 2006 til:

Hans Jørgensen, tlf 21 88 20/33 23 18, mss@skulin.fo

Ólav Hátún, tlf 21 18 88/31 18 19, olavasa@post.olivant.fo